LM-106/2020

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Fylgiskjal 8

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Tórshavn

Tórshavn 12. januar 2021

Hoyringsviðmerkingar um firmarotatiónsreglurnar

Vísandi til teldupost hin 7. januar 2021 frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum hava vit niðanfyri gjørt viðmerkingar til uppskotið um firmarotatión og til sjónarmiðini hjá Januar í skrivi dagfest 22. desember 2020.

Føroyar hava í nógv ár havt eina vinnufelagslóggávu, sum liggur tætt upp at lóggávuni í londunum uttan um okkum. Við ætlaðu ásetingunum um firmarotatión verður hettar eisini galdandi fyri okkara reglur viðvíkjandi óheftni. Hesum taka vit undir við.

Endamálið við reglunum um firmarotatión er økt óheftni í sambandi við grannskoðan av fyritøkum við stórum samfelagsligum týdningi. Føroysk frávik kunnu hava týdning fyri roknskaparbrúkarar, herundir íleggjarar á keypsskálunum í Oslo og Keypmannahavn og møguliga fyri Fíggjareftirlitið.

Viðvíkjandi viðmerkingunum hjá Januar er fyrst at siga, at Januar ikki viðger omanfyri nevnda endamál við ætlaðu rotatiónsreglunum. Januar ger hinvegin nógv burturúr at samantvinna rotatiónsreglurnar við trupulleikarnar við sertifisering. Í skrivinum nevnir Januar, at 15 feløg verða fevnd av ætlaðu rotatiónsreglunum. Til hettar er at siga, at fyri fleiri av feløgunum er einki krav um sertifisering av grannskoðarunum, og tí eru eingi serlig atlit at taka fyri hesi feløg.

Fyri peningastovnarnar v.m. galda krøv um sertifisering av grannskoðarum. Tað er rætt, sum Januar førir fram, at sertifiseringskrøvini gera, at fáir grannskoðarar kunnu bjóða seg fram. Her skal viðmerkjast, at tað longu í dag eru trupulleikar á økinum, og at hesir ikki gerast størri við ætlaðu rotatiónsreglunum. Rotatiónsreglurnar hava sostatt onga ávirkan á trupulleikan við sertifiseringunum. Hesin trupulleikin kundi hóskandi verði loystur við at gera neyðugar broytingar í kunngerðini um sertifisering av løggildum grannskoðarum.

Samanumtikið er okkara áskoðan, at rotatiónsreglurnar eiga at verða settar í verk, soleiðis at vit hava somu ásetingar sum londini rundan um okkum, tá ið tað ræður um óheftni hjá grannskoðarum hjá feløgum við stórum samfelagsligum týdningi.

Uttan rotatiónsreglur er sannlíkt, at Januar um fá ár fær eina monopolstøðu at grannskoða fíggjarligar fyritøkur við teimum hóttanum móti óheftni, sum tað inniber.

Vit skulu upplýsa, at vit taka undir við skrivinum frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar frá 22. desember 2020.

Vinaliga
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Miriam Haraldsen
statsaut. revisor

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

Staravegur 17, Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34

Stangaskákið 1, Postboks 346
FO-710 Klaksvík
Telefon 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Sp/f 2732